# er nóg mikið

práta um diskriminatión í hesum samanhangi.

Ingrid S. Henriksen hevur av sínum eintingum gjørt eitt uppskot til eina nýggja valskipan. Í uppskotinum hjá Ingrid verður verandi valdømi varðveitt, men uppskotið tryggjar samstundis, at bæði kyn verða stillað javnt í samband við uppstilling til løgtingsval:

– Hetta kann eitt nú tryggjast við at hava áseting í vallógini, ið sigur, at talið á monnum og kvinnum, ið stilla upp til løgtingsval, skal vera eins stórt, greiðir Ingrid S. Henriksen frá.

Í valuppskotinum hjá Ingrid verður Løgtingsvallógin broytt soleiðis, at veljarin setur kross annaðhvørt fyri tann listan, hann ætlar at velja, ella fyri tveimum av valevnunum á sama listanum – einum manni og einari kvinnu. Veljarin setur kross við tann av hesum báðum, hann velur sum fyrstvaldan og tann, hann velur sum næstvaldan. Hvør atkvøða fyri listanum telur 1, og skulu hesar atkvøðurnar lutast eins millum øll valevnini, sum fáa persónligar atkvøður á listanum. Hvør atkvøða, sum tann fyrstvaldi fær, telur 1,1, meðan atkvøðan, sum tann næstvaldi fær, telur 1,0:

– Uppskotið hjá mær leggur upp til, at politisku flokkarnir skulu syrgja fyri at stilla upp bæði menn og kvinnur í sambandi við løgtingsval. Harumframt venja veljararnar til at javnteta menn og kvinnur, tá tað ræður um politiska umboðan og at sita fyri leiðslu landsins, sigur Ingrid S. Henriksen.

Hon leggur afturat, at politiskir flokkar skulu bera kostnaðin av valstríðnum, og at tað skal ikki vera loyvt hjá einstaklingum at fíggja valstríðið úr egnum lumma:

– So hava vit eitt breitt fólkaræði, og øll valevni fáa møguleika at stilla upp við somu treytum, sigur Ingrid, sum heldur, at uppskotið hjá sær gevur meira javnstøðu á tingi og fjølbroyttari arbeiðslag í løgtinginum, har bæði kynini fáa rúmd til gagns fyri alt Føroya fólk.

– Nú er nóg mikið, tí havi eg gjørt hetta uppskotið. Vónandi kann tað geva íblástur til onnur uppskot, sigur Ingrid S. Henriksen at enda.



*Ingrid S. Henriksen greiðir her frá uppskotinum hjá sær til eina nýggja valskipan:*
*- Løgtingið prátar og prátar um javnrætt, men um vit kvinnur ikki traðka til nú, fer tað at taka alt ov nógv ár, áðrenn nakað sum helst hendir*

Bjarni Djurholm:

## – Skulu royna at fáa nógvar kvinnur á ting

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, var millum fáu menninar, sum í illveðrinum vóru komnir at lýða á fyrilestrarnar á Hotel Hafnia leygardagin. Men Bjarni kendi seg væl sum hani millum allar hønurnar:

– Evnisdagurin í dag hevur verið viðkomandi, framløgurnar hava givið íblástur til kjak og eg taki fult undir við teimum kvinnum, sum í dag hava prátað um, at tað átti at verið eitt valdømi, segði Bjarni Djurholm, sum er sannførdur um, at vit skulu royna at fáa so nógvar kvinnur, sum tað letur seg gera, á ting.

Hann legði afturat, at við einum valdømi hevði tað verið lættari at skapað eitt javnt býti millum menn og kvinnur á tingi:

-Tað er skilagott. Eisini kunnu vit í Føroyum heilt víst nýta nógv av tí, sum Hólmfríður úr Íslandi greiddi okkum frá. Vit, sum hava verið til fundin, hava fingið okkurt heim við í skjáttuni at hugsa um. Eg vóni, at tiltakið í dag verður fyrsti partur av einari røð av seminarum, segði Bjarni Djurholm at enda.

**- horsdal**

# ka skipanin er spælipláss hjá mannfólki

– Í 1998 samtykti íslendska Altingið at gera eina fýraársætlan fyri at fáa javnrætt millum kynini í politikki. Ætlanin fevndi eitt nú um upplýsing og lýsingaátøk. Tá arbeiðið byrjaði, var stórur dentur lagdur á at hava gott samstarv við fjølmiðlarnar. Og fyri at fáa tað besta úrslitið varð alt gjørt í tøttum samstarvi við politisku flokkarnar, greiddi Hólmfríður Sveinsdóttir frá.

Hon legði afturat, at somuleiðis vórðu kvinnurnar eggjaðar til at stilla upp til val við mennandi fyrilestrum og skeiðum kring landið. Fyrsta átakið í ætlanini var tó at gera eina gallupkanning, sum sera greitt staðfesti, at stórur meiriluti var fyri at økja um kvinnuleiklutin í politikki.

– Til Altings valið í 1999 og kommuvalið í 2002 varð tikið stig til eina víðfevnandi lýsingaherferð, hvørs endamál var at ávirka politikararnar og at fáa umtalu frá fjølmiðlunum og almenninginum. Fleiri politiskir leiðarar vóru við til at gera lýsingarnar fyri at lýsa munin millum kynini og at vísa á, at tørvur er á báðum. Lýsingaherferðin vakti miklan ans og fekk íslendsku stjórnina at gera nakað við málið at fáa fleiri kvinnur inn á ting, segði Hólmfríður Sveinsdóttir.

Hon heldur, at um ein skal royna at økja um kvinnuleiklutin í politikki, er nógv ymiskt at hugsa um:

– Politiska skipanin er gjørd av monnum og er teirra spælipláss. Vit noyðast at broyta henda gamla hugsanarháttin um, at menn standa á odda og taka allar tær týdningarmiklu avgerðirnar.

– Vit noyðast at granska politisku skipanina, og hvussu vit møguliga kunnu broyta hana, so bæði kynini kunnu arbeiða saman. Valskipanin, valdømini, kommunurnar og politisku flokkarnir eru faktorar, sum vit noyðast at eftirkanna, legði hon dent á.

Hólmfríður er tó sannførd um, at javnrættur kemur ikki bara av sær sjálvum:

– Tað er okkara skylda at arbeiða fyri javnrætti, og tað gleðir meg almikið, at føroyingar nú av álvara eru farnir undir at økja um kvinnuleiklutin í politikki, segði Hólmfríður Sveinsdóttir at enda.



*- Politiska skipanin er gjørd av monnum og er teirra spælipláss. Vit noyðast at broyta hetta, segði Hólmfríður Sveinsdóttir millum annað á evnisdegnum á Hotel Hafnia leygardagin.*




*Láturin millum áhoyrarnar var nógvur, tá Hólmfríður vísti lýsingarnar, sum til Altings-valið í 1999 og kommuvalið í 2002 floymdu yvir Ísland. Lýsingarnar høvdu stóran týdning í stríðnum at fáa fleiri kvinnur upp í politikk.*

## FAKTA

Hólmfríður Sveinsdóttir hevur verið aktiv í íslendskum politikki í 12 ár. Eisini hevur hon drúgvar royndir við nevndararbeiði og ábyrgdarstørvum. Árini 1998-2003 sat hon í nevnd, ið virkaði fyri øktum kvinnuleikluti í íslendskum politikki. Nevndin skipaði fyri fleiri áhugaverdum og øðrvísi átøkum, og úrslitið sást aftur í, at glið kom á kvinnuligu luttøkuna í samfelagsmálum og politikki.